# Eyðun av Reyni í Focus

**Eitt egið kenslusemi eyðkennir málningarnar hjá Eyðuni av Reyni á framsýning, sum letur upp í Galeri Focus fríggjadagin**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin klokkan 16 letur upp framsýning í Galerie Focus við verkum eftir listamannin Eyðun av Reyni.

Málningarnir hjá Eyðuni av Reyni eru sjálvstøðugir og sterkir. Enn sum áður er myndevnið landslagið, ið tykist at vera ein ótømandi kelda fyri hann. Vanliga ber til at finna eina havsbrúgv aftanfyri litløgini í hansara verkum, og tann havsbrúgvin virkar sum eitt grundarlag í flatanum og gevur myndini eina ávísa dýpd. Havið hevur mong andlit, og tað sæst í myndunum hjá Eyðuni av Reyni.

### Egið kenslusemi

Eyðun av Reyni tekur sítt listarliga støði í eini siðbundnari føroyskari landslagsabstraktión, men hevur flutt seg inn í næstan reina abstraktión.

Kortini er altíð okkurt, tú kennir aftur í málningunum, altíð ein tilsiping til fjallið, býin, havnina, tað skiftandi ljósið, ógvusliga veðurlagið. Tað kann vera ein ávísur litur, sum trokar seg fram aftanífrá, ein einstøk strika ella eitt ávíst strok, sum fangar eygað.

Eitt serligt egið kenslusemið hevur altíð eyðkent myndirnar hjá Eyðuni av Reyni. Seinnu árini er hartil komin ein øðrvísi rúmd í myndirnar, íbirt av breiðum, svørtum strokum, sum leggja seg útyvir teir kláru, reinu litirnar og mana fram eina nýggja annarleiðis kenslu av dýpd.

Framsýningin í Galerie Focus verður opin til 9. oktober, týsdag til fríggjadag frá klokkan 15 til 18 og leygardag frá 16 til 18.



*Eyðun av Reyni við nýggja málninginum, »Klettar, hav og stormur«*

# Krimirøðin um tríggjar vinkonur heldur fram

**Niðurteljingin til at ein av teimum trimum vinkonunum skal doyggja heldur fram, nú triðja bókin í krimirøðini »3 vinkonur« er komin út**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í nýggju bókini, sum hevur heitið *Tað, sum fer at henda*, ganga vinkonurnar Nora, Vilborg, Benadikta og Trina í tíggjunda flokki. Í flokkinum gongur eisini sjarmørurin Nick, sum er elskuligur, men eisini gátuførur… Nú bilgist óttin fyri at vera øðrvísi í Trinu. Hon skúgvar kenslurnar fyri Vilborg burtur og leggur í staðin alla orku í at koma saman við einum dreingi. Um somu tíð royna Nora og Nick at menna eitt parlag sínámillum, uttan at nakar annar fær frænir av tí.

Men sum vit minnast, byrjaði alt í níggjunda flokkin, tá ein ung genta verður funnin deyð, rekandi á lítla vatninum í Djúpadali. Hon er nakin og ballað inn í plast. Vit fáa at vita, at tann deyða er ein av fýra vinkonum – Vilborg, Benadikta, Nora ella Trina. So verður tíðin skrúvað tríggjar vikur aftur eftir, og vit sleppa at fylgja við í gongdini framman undan morðinum.




*Forelskilsini og óhugnin halda fram í nýggju bókini í krimirøðini „3 vinkonur"*

### Forelskilsi og óhugni

Tá ið tíggjundi flokkur byrjar eftir summarfrítíðina, fáa tey eina nýggja lærarinnu, Sunnvá Viksveen, sum fjeppist uppi í dreingjunum, men speirekur genturnar. Nora, Vilborg, Benadikta og Trina seta sær fyri at revsa Viksveen eitt sindur. Tær fara út til húsini, sum hon leigar, mitt í skóginum. Tað vil so til, at tær síggja Viksveen lata seg í og gita, at hon hevur fingið sær eitt fríggj við einum manni. Vinkonurnar smoyggja niður um seg og vísa rumpuna beint upp í stovuvindeygað - og rýma. Tá ið hon rennur burtur, sær Nora í einum glotta ferilin av einum fólki inni í húsunum. Tað einasta, hon sær týðiliga, er ein tatovering á arminum oman fyri alboga á viðkomandI – eitt reytt k.

Ein nýggjur drongur kemur eisini í flokkin: Nick. Hann er fosturbarn og eitt ár eldri enn hini. Nógvar søgur ganga um hann – millum annað, at hann er kriminellur, og at hann hevur neyðtikið eina gentu. Men bæði Benadikta og Nora verða forelskaðar í honum.

Í einari veitslu togar Benadikta Nick við sær inn í eitt kamar á loftshæddini. Hon roynir at lokka hann, men hann sigur nei. Hann hevur fingið hug á Noru. Benadikta svør so dýran, at hetta skal hon níva honum aftur. Lítla løtu eftir tað møtast Nora og Nick í gongini uttan fyri kamarið. Beint tá ið tey skulu kyssast, sær Nora, at hann hevur eina tatovering – eitt lítið, reytt k. Tað var hann, sum var hjá Viksveen. Nora avtalar kortini at fara í biograf saman við honum seinni, men tey mugu gera tað í loyndum, so at Benadikta ikki fær frænir av tí, og vinalagið millum Noru og Benadiktu verður spilt.

### Nakinmyndir á netinum

Í somu veitsluni mussast Vilborg og Trina. Tær báðar verða forelskaðar, men alt verður oyðilagt, tá ið Sunnvá Viksveen tekur tær á bóli í einari heitari hálsfevning í skóginum. Viksveen roynir at kroysta tær til at gera nakað fyri seg – ella er tað við seg? Trina verður ræðslusligin og sigur nei. Hon slær Vilborg og sigur, at hon angrar tað, sum tær hava gjørt.

Nú sendir Benadikta myndir av sær sjálvari nakn-samband við hana á internetinum. Hon fjalir andlitið á sær og heldur seg vera navnleysa á netinum, men tað vísir seg, at Wolfman veit, hvør hon er…

Og niðurteljingin heldur fram – til tann dagin, tá ið antin Nora, Benadikta, Trina ella Vilborg skal doyggja. Men tá ið fyrsta morðið hendir – sum snar-ljós av klárum himli – tá er tað ein heilt onnur, sum má lata lív. Ein, sum stendur teimum fýra gentunum nær ...

### FAKTA

Kjetil Johnsen (f. 1966) er viðgitin norskur ungdómsrithøvundur. Bøkur hansara eru óvanliga væl dámdar í Noregi og hann gjørdist serliga kendur fyri sínar 18 metsølubøkur við felagsheitinum "Tusen biter".

Jákup í Skemmuni hevur týtt *Tað sum skal henda*, og útgevari er forlagið Nýlendi. Næsta bókin í røðini eitur *Ballað inn í plast* og hon kemur út í mars mánað í 2009.

Bókarøðin 3 vinkonur er serliga ætlað ungum millum 12 og 16 ára aldur. Henda nýggjasta bókin, Tað, sum fer at henda, er 192 blaðsíður og fæst í øllum bókabúðum fyri 100 krónur.